

COSLPioneer. Mynd: COSL

# 229 missa arbeiðið á boripallinum sum boraði Brugduna

**Jógvan Hugo Gardar**

25.06.2015 - 09:25

Oljan.fo

- Hetta er tyngsti dagurin í okkara søgu sum felag, sigur stjórin á COSL, Jørgen Arnesen, í samrøðu við offshore.no. Í gjár gav Statoil boð um felagið sigur upp avtaluna um at brúka COSLPioneer-boripallin. Hetta er boripallurin sum Statoil, ExxonMobile og Atlantic Petroleum brúktu til at gera royndarboringarnar á Brugduni II.

209 starvsfólk umborð á COSLPioneer og 20 fólk í landi missa arbeiðið.

Statoil hevur valt at siga avtaluna frá sær nú, hóast avtalan er galdandi til august í 2016. COSLPioneer hevur ikki havt nakað at gera síðani í oktober 2014.

Ætlanin var at COSLPioneer skuldi til arbeiðis aftur tann 1. august í ár, men Statoil hevur ikki funnið nakrar uppgávur til hann, tí noyðist COSL nú at senda fólk heim.

Starvsfólkini hjá COSL Drilling Europe gjørdu í vetur eina avtalu við arbeiðsgevaran um at fara tíggju prosent niður í løn. Avtalan bleiv gjørd við tí fyritreyt at lønin skuldi uppaftur til heystar. Hetta verður nú av ongum, og í staðin missa starvsfólkini størvini.